# Oyggjablaðið

## Oyggjablaðið í næstu viku: Trøllanes

**Oyggjaredaktiónin:**




Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

## Hesaferð: Kvívík

**Hetta Oyggjablaðið hevur Kvívík og Kvívíkar kommunu í fokus. Lesið í hesum blaðnum hetta:**

**Síða 16:** Stubbar úr Kvívík

**Síða 18-19:** Gunnvá: Deiliga bygdasligt í Kvívík

**Síða 20-21:** Ein barnagarður til framtíðina

**Síða 22:** Hús nr. 5 í Kvívík

**Síða 24-25:** Borgarstjórin: Ikki bara leggja saman

**Síða 26:** Lítil handil við stórum úrvali

**Baksíðan:** Lina skrivar fyri kommununa

# Støðugt fólkatal




*Bæði í fólkatali og inntøku hevur vøkstur verið í Kvívíkar kommunu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fólkatalið í Kvívíkar kommunu, sum fevnir um bygdirnar Válur, Kvívík, Stykkið, Leynar og Skælingur, hevur verið rættiliga støðugt seinastu árini.

Í einum yvirliti frá Hagstovuni sæst, at fyri 25 árum síðani búðu 513 fólk í kommuni, men síðani er tað vaksið ár undan ári.

Seinastu 20 árini hevur tað ligið rættiliga støðugt um tey 600 fólkini. Við seinastu teljing vóru 594 fólk í teimum fimm bygdunum.

Tá tað búðu flest fólk í kommununi búðu so mong sum 615, meðan fægst vóru í kommununi í 1985, tá 102 fólk færri búðu her.

Í løtuni eru fleiri grunddøki tøk í kommununi, millum annað í Leynum, og tí eru útlit fyri, at fólkatalið aftur kann fara at vaksa í Kvívíkar kommunu.

**sb.**

# Vaksandi inntøka í Kvívík

**18,5 mió krónur!**

Hóast búskaparligu kreppuna, fekk Kvívíkar kommuna meiri inn í skatti í fjør enn væntað.

Sambært nýggjasta yvirlitinum frá kommununi sæst, at inn kom so nógv sum 18.575.209 krónur í kommunuskatti í 2010.

– Hetta eru 657.987 krónur fleiri enn í 2009. Tá komu inn 17.917.222 krónur, verður upplýst. Munurin – ella vøksturin – er uppá 3,67%.

Í 2009 var inntøkan øðrvísi. Tá var munurin - 0,62% í mun til 2008.

Væntaða inntøkan í fíggjarætlanini fyri 2011 er 18,5 mió krónur.

**sb.**

# Eitt stykki av Stykkinum

Beint fyri middag mikudagin í farnu viku, loysnaði ein 20-25 tons tungur klettur úr beninum framvið landsvegnum - á einum stykki tey kalla "Í Sortanum" - á Stykkinum við Leynar.

Hóast nakað av smágróti kom á gongubreytina, var kortini ongin vandi á ferð, skrivaði Landsverk tá.

Hetta er tíðin við skiftandi frosti og bloti í jørðini, og tí kann altíð væntast, at grót ella annað tilfar loysnar úr lendinum ymsastaðni í landinum.

Landsverk arbeiðir við at kanna og tryggja benið á Stykkinum móti fleiri lopum. Framvið staðnum hava teir sett upp fráboðan um vandan fyri, at meiri kann loysna.

*snorri@sosialurin.fo*



**STÓRT STYKKI**

*Tað sær ógvusligt út, nú hesin stóri kletturin loysnaði úr beninum mikudagin í farnu viku. Tíbetur hendi eingin skaði*

*Mynd: Jens Kristian Vang*